**Leiðslufundur 7. februar 2017**

| | |
|---|---|
| Heiti: | Leiðslufundur |
| Til staðar : | Sigurð í Jákupsstovu, Janus Jensen, Hans Pauli Joensen, Hans Andrias Sølvará, Jørgen Meitilberg, Bergur D. Hansen og Hugin Skaalum |
| Skrivað hevur: | JM |
| Fundartíð: | týsdagur, 7. februar 2017 |
| Fundarstaður: | Setursskrivstovan |

## Mál til umrøðu:

1. **Búskaparskipan Landsins – fíggjarætlan fyri hvørja deild – dekanar tilmæla mánaðarliga roknskapin til fíggjarleiðaran**

   Fyri styrkja um fíggjareftirlitinum á Fróðskaparsetur Føroya, er avgerð tikin um at dekanarnir skulu tilmæla mánaðarliga roknskapin mótvegis fíggjarleiðaranum, sum síðani tilmælir mótvegis rektaranum, sum so góðkennir roknskapin mótvegis Gjaldstovuni/FMR.

   Dekanar tilmæla mótvegis fíggjarleiðaranum, har teir skulu fyrihalda seg til:
   a) Um fíggjarætlanin kemur at halda?
   b) Um útreiðslurnar til leysalærarar koma at halda, ella um nakrar broytingar eru í mun til upprunaligu fíggjarætlanina?
   c) Um inntøkumetingin kemur at halda?
   d) Um útreiðslur sum hoyra tíðarskeiðinum til eru bókaðar?
   e) Fíggjarleiðarin tilmælir mótvegis rektaranum
   f) Rektarin góðkennir mótvegis Gjaldstovuni/FMR

   Tørvur er á at skipa fyri skeiði í Búskaparskipan Landsins. HS setir seg í samband við Gjaldstovuna hesum viðvíkjandi.

   Avgerð tikin um at heita á starvsfólk, um at avhalda 6. feriuviku. Avgerðin er grundað á, at fíggjarstøðan er so trong. Dekanarnir taka málið upp á komandi deildarfundum.

2. **Møguligar umvælingar/broytingar av hølunum í Jónas Broncks gøtu 25**
   Ynski er um bøta um lestrarumhvørvið hjá studentunum á Jónas Broncks gøtu í sambandi við, at onnur deildin flytur í Sjóvinnuhúsið. JM setir seg í samband við útleigaran P/F Dygd fyri at kanna, um tað ber til at gera tillagingar í bygninginum og fáa kostnaðin av hesum inn í sáttmálan.

3. **Ymiskt**
   Kunning um felags lestrarbyrjan eigur at leggjast út á heimasíðuna. Lesturin byrjar í viku 34 og endar í viku 25.

   Næsti stýrisfundur verður mánadagin 13. februar. Fundurin verður á DTU í Lyngby.